# HEILSANIR



**Góða Kristina og Jón**
Hjartaliga tillukku við 5 ára døgunum 23. september. Mamma og babba ynskja tykkum ein góðan føðingardag. Jesu pápi signi tykkum ríkliga.



Vit vilja við hesum takka øllum, sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum 24 juli. Ein hjartans tøkk til børn, svigarbørn barnabørn við maka, sum gjørdu okkum dagin ógloymandi.
**Frinoma og Petur Jacobsen**



Hendan daman hevði ein rundan dag tann 15. Vit vilja ynskja henni hjartaliga tillukku.
**Heilsan: Vit í Nesi og Oyndarfirði**


Sosialurin *Heilsanir* kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn:________________________________________

Bústaður:________________________________________

Bygd/býur:______________________Tlf.:__________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


**Krúndiamantbrúdleyp**
Sunnudagin 28. september kunnu hjúnini Ella og Jákup Martin Sólbjørg, Klaksvík, halda krúndiamantbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá krúndiamantbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin frá kl. 16 undir Klakk 5.

**Brúdleyp**
Maibrit og John Marni Forná giftast leygardagin 27. september í Keypmannahavn. Adressan er: Lergravsvej 52, 1. t.v., 2300 København S.

**95 ára føðingardagur**
Hósdagin 25. september verður Niels Pauli Djurholm, Kollafjørður, 95 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. september fyllir Anna Jacobsen, Hoyvíksvegur 31, Tórshavn 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. sept frá kl. 10-16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 24. september fyllir Poli Jacobsen, Miðvágur, 90 ár. Dagurin verður hildin á Ellisheiminum á Sýnini frá kl. 16-19.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. september fyllir Jóan Pauli Johannesen, vanliga nevndur Palli í Jákupsstovu, Vestmanna, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin ið Miðhøllini í Vestmanna skúla sunnudagin 21. september frá kl. 16-20.

**75 ára føðingardagur**
Sunnudagin 28. september fyllir Bent Mortensen, Vágur 75 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá Beintu og Herbert í Rituvík frá kl. 17.00.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 24. september fyllir Jógvan Elis Danielsen, kokkur, Alfehøjvej 66, 4684 Holmegård (við Næstved) 70 ár.

**70 ára føðingardagur**
Sólvá M.Nielsen verður 70 ár 9. okt. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. okt. kl 19.00 í Samljóð, Skopun. Tey sum vilja gleða Sólvu við at koma í føðingardag, biða vinarliga siga frá áðrenn mánadagin 6.okt. á tlf. 361918 ella 361318

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 25.oktober verður Thordis Skaalum, Sørvágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági 25. oktober kl. 19.00. Tey, ið vilja verða við til at gleða meg og gera dagin hugnaligan, vinarliga ringi til tlf. 333119 ella 227216 í seinasta lagi 10.oktober. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**50 og 55 ár**
Leygardagin 11. oktober kl. 19.00 halda Hervør og Dánial Jákup Jørgensen úr Miðvági 50 og 55 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági. Tey, ið vilja gleða okkum okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 27. september á telefon 33 32 04 og 22 96 04 ella á teldupostí: herdan@post.olivant.fo


Nokia E51

Septembertilboð

Vinnufartelefon við Bluetooth, FM-útvarpi, MP3-spælara, 2 MP myndatóli, WLAN, Symbian OS 9.2 stýriskipan og document viewer. Tekur upp til 8 GB minniskort.

Fæst á vodafone.fo og í vodafone-handlunum.

kr. 2495



Løtan er tín

vodafone